

**Jákup Símun Simonsen**
*býráðslimur Tjóðveldi*

# Fótbóltsvøllur í Hoyvík

## *politiskt fairplay harra Levi Mørk!*

Síðani eg varð valdur í Tórshavnar býráð hevur eitt av mínum hjartamálum verið at fáa fótbóltsvøll staðsettan og gjørdan í Hoyvík.

Havi í fleiri umførum lagt hettar fyri samgonguna í Tórshavnar býráði við sakligum grundgevingum um fólkavøkstrur og at tryggja góðar umstøður fyri okkara borgarar í økinum. Havi víst á Dalin langa niðanfrá Hoyvíkshøllini sum best egnaða stað til vøllin, grundað á veðurumstøður, tilkomu, støðd av øki v.m.

Helt at allar flestu samgongulimir tóku undir við hesi skilagóðu ætlan, men málið fær brádliga eina vend í 2010 har m.a. býráðslimurin Levi Mørk mótarbeiddi ætlanini, og tók ikki undir við mínari ætlan, um at staðseta vøllin í Dalinum langa, men staðsettu vøllin á vindharðasta plássið á Hoyvíkshæddini við Skúlan á Løgmannabreyt.

Málið er frá mínari síðu ongantíð slept í samgonguni, og tá nú Levi Mørk í grein á Vágaportalinum ger mína ætlan til sína egnu, er neyðugt at tala at og greiða frá hesum í rætta samanhanginum. Tað er ikki Levi Mørk sum hevur lagt hetta fram á samgongufundi, men undirritaði.

Tað er tó hugaligt, at Levi Mørk nú loksins er komin til somu niðurstøðu, sum eg havi lagt fram fleiri ferðir, men eitt lítið sindur av politiskum fair play má krevjast - sjálvt av Levi Mørk.

Gott at tú ert komin til arbeiðis!



**Levi Mørk**
*býráðslimur*

# Ditto Harra Jákup Símun Simonsen býráðslimur!

Nú síggi eg á vágaportalinum í kvøld, at Jákup Símun fær ilt av, at eg vil hjálpa honum og Hoyvík við at fáa nýggjan fótbóltsvøll til Hoyvíkar, t.e, er nýggja staðseting av fótbóltsvøllinum í Hoyvík.

Jú, Harra Jákup Símun Símunsen, býráðslimur, hevur havt málið um staðsetingina fyri á samgongufundum í býráðnum, lat tað nú verða sligið fast.

Eg vísi bara til í mínum skrivi, at nú stendur tú ikki einsamallur í hesum málið og nú eri eg eisini bjóðaður við í hesum dysti, og eg taki av tí tilboði sum eg havi fingið frá fótbóltsáhugaðum í Hoyvík við, at fáa ein nýggja fótbóltsvøll til Hoyvíkar. Møguliga okkurt hendir nú, tá ið eg eri farin til arbeiðis???

Góði Jákup Símun! Haldi bara at tú mást hava eitt sindur av hjálp við hesum fótbóltsvølli. Eg vil bara fegin hjálpa tær upp á sama máta sum, tá ið tú í miðlunum herfyri frøddist um, at ungdómsvirksemi Klubb 188 í Hoyvík var komið á fíggjarlógina fyri 2011. Eg svaraði tær ikki aftur tá, men geri tað so nú.

Tú veit líka so væl sum eg, at skipað tilboð til ungdómin í kommununi eru partar av mínum hjartamálum í hesum valskeiði. Men eg fái ikki nakað ígjøgnum politisk einsamallur. Nei her mugu fleiri atkvøður til. So tá ið tú fórt út í miðlarnar herfyri við nýggja ungdómshúsinum KLUBB 188, tá var talan ikki um nakað fairplay frá tínari síðu. Eg havi skrivað og barst fyri ungdómshúsinum í Hoyvík í fleiri ár, um tú skuldi ivast í tí, og tað havi eg havt á skrá til samgongufund í 2 ár.

Hinvegin havi eg brúk fyri tær í mentamálanevndini fyri at fáa ymisk politisk mál ígjøgnum, líka so væl sum tú hevur brúk fyri mær í byggi- og býarskipanarnevndini fyri at fáa nýggja staðseting til fótbóltsvøllin í Hoyvík ígjøgnum. Soleiðis er politikkur jú einaferð Jákup Símun. Eg havi bara játtað at hjálpa til, tí eg føli at avgerðin í byggi og býarskiparnarnevndini var skeiv og tað vil eg hjálpa tær við at rættað uppá.

Hinvegin havi eg ikki nakað ímóti, at vit í samgonguni er felags um politisk mál. Fótbóltur og ítróttur hevur eisini mín áhuga í mínum arbeiði sum býráðslimur hjá Tórshavnar kommunu.

Tað er annars er gleðiligt, at tú følir at tú hevur verið nóg mikið til arbeiðis við at staðseta nýggja fótbóltsvøllin í Hoyvík. Eg haldi bara sum búgvandi í Hoyvík, at her skal meira arbeiðsorka til.

Tí síggi eg ikki meira í hesum skrivi enn »ditto« til Jákup Símun Simonsen. Lat okkum báðar, nú fara til verka.

Við nýggjari arbeiðsorku.



**Kári á Rógvi**
*løgtingsmaður og formaður Sjálvstýrisfloksins*

# Stýri aftur í Sjálvstýri

Føroyska framburðsrørslan hevur alt ov leingi latið afturhaldið lýst kjakið sum val í millum 'det bestående' og so loysing. Vit mugu seta dagskránna aftur: framburð!

Sjálvstýrisflokkurin er framhald av Føroya Framburðsfelag ið stovnað var í 1903. Hetta felag stillaði upp til løgtingsvalið 1905 og fekk góða undirtøku. Felagið hevði á dagsskrá skúlaskap, nýggjar vinnur, javnstøðu, mál og mentan og annað á framburðsleið.

Um hetta mundið eydnaðist tingmonnum føroyinga í Danmark, teir vóru Christian Bærentsen á landstingi og Jóannes Patursson á fólkatingi, at fáa í lag avgjald á stórhval veiddan undir Føroyum. Tað málið kann sammetast við bæði yvirtøku av undirgrundini og ikki minst ætlan okkara um at flyta skattabyrðuna yvir á tilfeingi. Eins og stórhval kundu vit lagt gjald á makrel og harvið bæði fingið pengar í kassan og tryggja okkum, at tey vinnuliga skilabestu sleppa framat; búskapur veksur, lønir vaksa, undirskot minka.

Ísland fekk í sama tíðarskeiði heimastjórn – og føroyingum stóð í boði í 1906 at fáa størri heimildir at stýra landinum. Men tíverri kom val í ótíð hetta árið, har pressan eins og nú ávaraði ímóti separatistum og óðum verkum; eftir ólavsøku 1906 boðaðu so 13 tingmenn, at teir nú sótu saman í flokki undir heitinum 'Sambandsmenn.'

Framburðsrørslan varðveitti lokalt navnið 'Framburðsfelag', men lat tíverri afturhaldið definerað okkum sum 'Sjálvstýrismenn' - Sjálvstýri v. Samband gjørdis kjakhøpið í Føroyum næstu øldina, heldur enn: 'hvussu fáa vit framburð?'

Nú er tímin komin aftur at taka framburðin fram í ljósið. Skúlaskapur, nýggj vinna, javnstøða, mál og mentan, eins og nýskipan av verandi fyrisiting og hevdvunnari vinnu eru framvegis líka neyðug (og líka forsømd). Vit mugu tosa um framburð aftur.

Kundu vit útint mangt eitt roysnisverkið

Nú er so vanligt at skifta samleika. Kanska kundi Sjálvstýrisflokkurin fingið nýtt búmerki og itið Stýra ella Framá. Men slíkt krevur helst drúgvari viðgerð. Sum floksformaður vil eg tó uppundir brátt komandi valið lova hereftir at leggja dent á at fáa 'Stýri' aftur í Sjálvstýri.

Vit mugu leggja dent á, at vit vilja stýra landinum. At vit vilja umraðfesta, at vit duga at skipa stovnar betur, antin teir so svimja ella fyrisita, at vit tora at leggja rímiligar byrðar á, at vit megna at taka av aftur skipanir ið eru farnar av tíð.

Hetta má síggjast í verki meir enn í orðum. Eins og hvalagjaldið má tilfeingisgjald koma í okkara tíð. Men samstundis má lønarskatturin minka, so hugurin at virka veksur, færri flyta av landinum og lønin hjá teimum lágløntu munar meiri.

Lestrarpláss mugu skapast av mongum slagi, yrkisútbúgving, eftirútbúgving, hægri útbúgving eisini fyri tey tilkomnu og tey ið bert kunnu lesa parttíð.

Men hvat so við yvirtøkum og hvussu við fullveldi? Hesi mugu bert nýtast sum miðlar. So hvørt vit stýra landinum meira, so hvørt síggja vit fleiri málsøki ið vit mugu taka á okkum, so hvørt ráðini batna og førleikar mennast, kunnu vit seta okkum størri mál og taka longri stig.